# Samferðslumálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 28. jan. 2019
Mál nr.: S3004-004/19
Málsviðgjørt: AP
Eftirkannað:

**Løgtingsmál nr. xx/201x: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
(Heimild til landsstýrismannin til at gera reglur um koyri- og hvílutíð)

**§ 1**

Í løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 158 frá 13. desember 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftan á § 40 verður sett:

*"Reglur um koyri- og hvílutíðir*
**§ 40 a.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um koyri- og hvílutíðir og kann gera av, at reglur um koyri- og hvílutíðir ásettar av danska ferðslumálaráðharranum, heilt ella partvíst skulu galda her á landi.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta treytir um at víkja frá reglunum í stk. 1, í tann mun hesar ikki skulu vera galdandi.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann flyta umsitingina av teimum í stk. 1 og 2 nevndu ásetingum til almennan myndugleika, einskilda fyritøku ella líknandi. Í hesum sambandi kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um serliga góðkenning av slíkum myndugleikum ella fyritøkum. Harafturat kann hann áseta reglur um virki hjá myndugleikanum ella fyritøkuni í sambandi við umsitingina av uppgávunum sbrt. stk. 1 og 2.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í sambandi við ásetingina av neyvari reglum um atgongdina hjá verkstøðum, montørum og bilframleiðarum at fáa góðkenning at íseta, eftirkanna og umvæla takografin, sum er fevndur av reglunum í stk. 1 ella av reglum, sum eru ásettar við heimild í stk. 1 og áseta treytir um, at verkstøð, montørar ella bilframleiðarar geva seg undir eftirlit av einum almennum myndugleika, einskildari fyritøku ella líknandi, sbrt. stk. 3.
*Stk. 5.* Løgreglan hevur til eina og hvørja tíð, uttan rættarúrskurð, atgongd til virkishøli, virkisbøkur, skjøl o.a., undir hesum tilfar, sum er goymt talgilt við tí endamáli at eftirkanna, um ásetingarnar í stk. 1 eru hildnar."

**2.** Í § 58 a, stk. 2 verður aftaná "§ 39, stk. 1-2" sett: "§ 40 a,".

**3.** § 58 a, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Í fyriskipanum, sum verða útgivnar sbrt. lógini kann ásetast sektarrevsing fyri brot á ásetingarnar í fyriskipanunum. Harafturat kann ásetast revsing sum sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir fyri brot á tær ásetingar, sum eru nevndar í § 40 a, stk. 1, og fyri brot á tær ásetingar í fyriskipanum, sum eru givnar við heimild í § 40 a, stk. 1. Við áseting av sekt fyri brot á ásetingarnar um nýtslu av takografi, ferðskrivaraskjali og førarakorti, sum eru fevnd av 2. pkt., skal tað í metingini verða tikið við sum herdar umstøður í tann mun brotið er mett at forðað skjótum eftirliti við, at reglurnar í 2. pkt. eru hildnar."

**4.** § 58 a, stk. 6 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 6.* Fyri brot á fyriskipanir, ið eru givnar sbrt. § 38, stk. 1, kann áleggjast eigaranum ella brúkaranum av akfarinum sektarábyrgd, sjálvt um brotið ikki kann tilroknast honum sum gjørt við vilja ella av ósketni. Sama er galdandi fyri brot á tær ásetingar, sum eru nevndar í § 40 a, stk. 1 og fyri brot á fyriskipanir, sum eru givnar við heimild í § 40 a, stk. 1. Fyri sektarábyrgd verður ikki ásett umskiftisrevsing."

**5.** Í § 58 a verður sum stk. 13 sett:
"*Stk. 13.* Ásetingarnar í stk. 9-12 verða nýttar samsvarandi fyri brot á ásetingarnar í § 40 a, stk. 1 og fyri brot á fyriskipanir, sum eru givnar við heimild í § 40 a, stk. 1. Sektir fyri tey í 1. pkt. nevndu brot verða ásettar til 500 kr. ella hægri, og sum kunnu býtast við 500 kr."

**6.** Í § 58 c verða sum stk. 4 og 5 sett:
*"Stk. 4.* Løgreglan kann afturhalda akfør í teimum førum har brot er framt á:

1) reglur um mest loyvdu heildarvekt hjá akførum samsvarandi § 38,
2) reglur um koyri- og hvílutíðir, sum eru givnar sbrt. § 40 a, stk. 1, og fyri brot á fyriskipanir, sum eru givnar við heimild í § 40 a, stk. 1.

*Stk. 5.* Við atliti til at seta í verk hald eftir stk. 4 kunnu nýtast reglurnar í rættargangslógini um at leggja hald á lutir, ið hildið verður skulu inndragast. Akfør kunnu bert haldast aftur inntil akfarið ella viðurskiftini annars eru fingin í rættlag sbrt. teimum í stk. 4 nevndu ásetingum."

**7.** Í § 59 a, stk. 1, nr. 8 verður "." broytt til: ",".

**8.** Í § 59 a, stk. 1, verður sum nr. 9 og 10 sett:
"9) hann hevur framt brot á reglur um koyritíð ella hvílutíð, sum eru ásettar í § 40 a, stk. 1 ella tær fyriskipanir, sum eru givnar við heimild í § 40 a, stk. 1 við meiri enn 30 prosentum,
10) hann í einum trý ára tíðarskeiði hevur gjørt seg sekan í seks brotum viðvíkjandi takografinum, sum eru fevnd av ásetingunum í § 40 a, stk. 1 ella av fyriskipanum, sum eru givnar við heimild í § 40 a, stk. 1."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Seinastu árini er Føroyar farið frá at verða eitt samfelag, har neyðugt hevur verið at siglt millum flestu oyggjar, til at verða eitt samfelag knýtt saman í einum vegakervi við undirsjóvartunlum. Hetta hevur havt við sær, at út við 85 % av Føroya landi nú er samanbundið. Hetta samferðslumynstur fer framhaldandi at broytast, tá ið m.a. tríggir nýggir undirsjóvartunlar fara at síggja dagsins ljós innan eitt 10 ára skeið. Tískil fer ferðslan á landi at verða enn størri enn hon er í dag, og vegastrekkini verða væl longri, samstundis sum umstøðurnar at koyra á vegunum verða gjørdar betri.

Ein partur av stóru broytingunum í samferðslumynstrinum er, at farmaflutningurin í stóran mun er farin frá skipaflutningi til flutning við treylarum eftir landsvegakervinum, sum ger, at nógv tung ferðsla koyrir eftir vegunum.

Fyri nøkrum árum síðani blivu reglur um hvílutíð hjá sjófólki settar í gildi í Føroyum fyri at økja um trygdina á sjónum og fáa skipaðar reglur um arbeiðsumhvørvið hjá sjófólki.

Tað hevur verið frammi í fjølmiðlunum, at hvílutíðirnar hjá vinnuførarum ikki altíð hava verið virdar samstundis sum spurningur hevur verið settur við ferðslutrygdina.

Í desember 2016 setti Djóni Nolsøe Joensen, løgtingsmaður, landsstýrismanninum í Samferðslumálaráðnum ein munnligan fyrispurning um koyri- og hvílutíðarreglur í Føroyum. Táverandi landsstýrismaður hevði ongar ítøkiligar ætlanir um at seta í gildi reglur um koyri- og hvílutíð fyri føroyskar vinnuførarar, men vildi saman við pørtunum sum varða av ferðsluni og ferðslutrygd her á landi kanna tørvin fyri koyri- og hvílutíðarreglum.

Havandi í huga nullhugsjónina hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, verður tað mett at vera umráðandi, at reglurnar um koyri- og hvílutíð verða settar í gildi sum skjótast, áðrenn vanlukkur við álvarsligum fylgjum henda, m.a. orsakað av óskipaðum arbeiðsviðurskiftum.

Harafturat er tað ein fyrimunur, um vit her í Føroyum hava á leið somu reglur, sum tær, sum eru galdandi í londunum kring okkum.

Tí metir landsstýrismaðurin, at tíðin er komin har til, at koyri- og hvílutíðarreglur verða settar í gildi í Føroyum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi ferðslulóg hevur landsstýrismaðurin onga heimild til at gera reglur um koyri- og hvílutíð, og tí verður miðað eftir at fáa hetta sett inn í lógina.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at geva landsstýrismanninum heimild til at gera reglur um koyri- og hvílutíð, samstundis sum økt verður um ferðslutrygdina. Endamálið er eisini at fáa skipaði viðurskifti innan vinnuliga koyring í Føroyum, tað veri seg bæði viðvíkjandi koyring við bussum og lastbilum.
Vert er at hava í huga, at londini rundan um Føroyar longu hava tílíkar reglur, sum ein fylgja av ES- ella EØS-samstarvinum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið er ein heimild til landsstýrismannin at seta reglur, sum taka støði í altjóða reglum, sum m.a. Danmark og onnur skandinavisk lond hava sett í gildið. Enn hevur ein ikki gjørt sær endaligar tankar um, hvussu hesar reglur kunnu tillagast til føroysk viðurskifti.

Í Danmark er ein loyvd daglig koyritíð uppá 9 tímar. Í hesi loyvdu koyritíðini er ein kravd hvílutíð á 45 min., sum kann haldast samla ella t.d. býtast upp í tveir steðgir á 30 min. og 15 min.
Harafturat er ein kravd daglig hvílutíð uppá 11 tímar áðrenn næstu dagligu koyring. Somuleiðis er ein mest loyvd vikulig koyritíð uppá 56 tímar og ein kravd vikulig hvílutíð uppá 45 tímar. Harumframt eru tað fleiri undantøk frá meginreglunum, sum ikki skulu vera lýst her, men sum koma at framganga av teimum nærri ásettu reglunum í kunngerð.

Allir nýggir lastbilar og bussar sum koma frá verksmiðju hava ein takograf ísettan, sum ger at tað ikki skal gerast ein íløga í hetta hjá eigaranum. Takografurin er ein talgild skrásetingareind, sum skrásetur allar koyri- og hvílutíðir hjá øllum førarum av tí ítøkiliga bilinum.

Sum nakað nýtt er tað nú møguligt hjá vinnuligum bilførarum at bíleggja sær førarakortið hjá løgregluni í Føroyum. Framman undan kundi hetta bert gerast í Danmark. Førarakortið er eitt persónligt skrásetingarkort hjá føraranum, sum skrásetir dagligu koyri- og hvílutíðina hjá føraranum í takografinum.

Í sambandi við at ein hevur ætlanir um at innføra koyri- hvílutíðarreglur í Føroyum, átti at verið umhugsað at seta reglur um eina vinnuføraraútbúgving av vinnuførarum og eftirútbúgving fyri verandi førarir.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Er sent til ummælis, og ummælisfreistin er 4. februar 2019 kl. 12.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið kemur at hava fíggjarligar avleiðingar fyri tann myndugleika, sum kemur at umsita økið. Hvussu stórar hesar avleiðingarnar kunnu vantast at verða er ringt at siga í verandi løtu. Tað kann somuleiðis nevnast, at uppskotið kemur at hava fíggjarligar avleiðingar fyri løgregluna, sum skal hava eftirlit við, um ásetingarnar um koyri- og hvílutíð verða hildnar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið kemur at hava umsitingarligar avleiðingar fyri tann myndugleika, sum kemur at umsita økið. Vantast kann, at arbeiðsbyrðan hjá viðkomandi myndugleika fer at økjast nakað.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið kemur at hava ávísar avleiðingar fyri vinnuna, bæði fíggjarliga og umsitingarliga. Montørar, verkstøð o.a. mugu gerast klár til uppgávuna soleiðis, at koyri- og hvílutíðarreglurnar kunnu virka eftir ætlanini. Harafturat er tað skyldan hjá flutningsfyritøkuni at tryggja, at teirra førarir eru hóskandi útbúnir og hava móttikið neyðuga kunning um rætta nýtslu av takografinum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið er ein verja hjá arbeiðstakaranum fyri neyðugari hvíld og forðar fyri óforsvarliga langari arbeiðstíð í akfarinum. Uppskotið er sostatt við til at økja um ferðslutrygdina á vegakervinum.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið tekur útgangsstøði í ES-fyriskipanunum nr. 561/2006 frá 15. mars 2006 om harmonisering af visse sociale bestemmelser inden for vejtransport (køre- og hviletidsforordningen), nr. 165/2014 frá 4. feb. 2014 om takografer inden for vejtransport (takografforordningen) og FN’s europæiske overenskomst om arbejdet for besætninger på køretøjer i international vejtransport af 1. juli 1970 (AETR-overenskomsten).
Tó eru hesar fyriskipanir ikki settar í gildi í Føroyum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Ongir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru.

### 2.9. Markaforðingar

Við at geva landsstýrismanninum heimild í ferðslulógini til at gera reglur um koyri- og hvílutíð fer hetta at hava við sær, at tað verður lættari hjá bussum og lastbilum, sum koyra vinnuligt uttanlands. Føroyskir bilførarar, sum koyra vinnuliga koyring uttanlands fáa við jøvnum millumbilum trupulleikar í sambandi við koyringina. Orsøkin vísir seg oftast at vera manglandi møguleikin hjá føroyskum førarum at kunna brúka takografin, sum er tað tólið, sum skrásetir koyri- og hvílutíðina hjá føraranum, nøktandi.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ásetingar um revsing. Revsingin sum kann verða givin er sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir. Hetta verður mett at verða eitt neyðugt inntriv, sum somuleiðis verður mett at standa mát við lógarbrotið og endamálið í lógini.

Tað er alneyðugt, at bæði førarar og arbeiðsgevarar o.o. virða tær reglur, sum verða gjørdar. Brot á reglur um koyri- og hvílutíð kunnu hava við sær, at álvarsamar vandastøður íkoma, í ringasta føri við deyðsføllum. Við at áseta reglur um koyri- og hvílutíð, samstundis sum revsing fyri brot á hesar reglur verður ein partur av lógaruppskotinum vil landsstýrismaðurin fyribyrgja, at tílíkar støður íkoma.
Tó verður tað galdandi í Føroyum, eins og tað er í Danmark, eitt generelt toleransumark á 5 %, sum merkir, at ákæra bert verður reist í teimum førum, har brotið á reglurnar um koyri- og hvílutíð í hvørjum einstøkum føri er 5 % ella meira.

**2.11. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til nr. 1, § 40 a, stk. 1.**
Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um koyri- og hvílutíðir og kann gera av, at reglur um koyri- og hvílutíðir ásettar av danska ferðslumálaráðharranum, heilt ella partvíst skulu galda her á landi.

Landsstýrismaðurin hevur enn ikki tikið støðu til, hvussu reglurnar skulu virka í verki, men fer saman við pørtunum, sum varða av ferðsluni at umrøðu hesi viðurskifti.

**Til nr. 1, § 40 a, stk. 2.**
Landsstýrismaðurin kann áseta treytir um at víkja frá reglunum í stk. 1 í tann mun, hesar ikki skulu vera galdandi.

**Til nr. 1, § 40 a, stk. 3.**
Tað fara at vera góðkend verkstøð, sum fara at hava eftirlit við takografinum og góðkenna hann. Heimilaði myndugleikin skal góðkenna verkstøðini.

**Til nr. 1, § 40 a, stk. 4.**
Landsstýrismaðurin kann í sambandi við ásetingina av neyvari reglum um atgongdina hjá verkstøðum, montørum (installatørum) og bilframleiðarum at fáa góðkenning at íseta, eftirkanna og umvæla takografin, sum er fevndur av reglunum í stk. 1 ella av reglum, sum eru ásettar við heimild í stk. 1 og áseta treytir um, at verkstøð, montørar ella bilframleiðarar geva seg undir eftirlit av einum almennum myndugleika, einskildari fyritøku ella líknandi, sbrt. stk. 3.

**Til nr. 1, § 40 a, stk. 5.**
Við hesari ásetingini fær løgreglan eina ítøkiliga heimild til eina og hvørja tíð uttan rættarúrskurð at gera rannsókn í virkishølum, undir hesum akførum við takografum, virkisbókum, skjølum o.ø. og her undir eisini tilfar, sum er goymt talgilt í takografinum ella øðrum talgildum miðli, t.d. í teldu fyri at eftirkanna um ásetingarnar í stk. 1 eru hildnar. Hetta verður gjørt fyri at fyribyrgja, at próvtilfar verður burturbeint ella brongla (forvanskning).

**Til nr. 2, § 58 a, stk. 2.**
Heimild fyri, at løgreglan kann geva eina herda bót fyri brot á ásetingarnar í § 40 a.

**Til nr. 3, § 58 a, stk. 5.**
Heimildin í § 58 a, stk. 5 um at áseta sektarrevsing fyri brot á ásetingarnar í fyriskipanunum, sum verða útgivnar sbrt. lógini, verður við hesum víðkað til eisini at fevna um reglurnar um koyri- og hvílutíð og brot á ásetingarnar um nýtslu av takografi og førarakorti v.m.
Revsingin kann ásetast sum sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir fyri brot á tær ásetingar, sum eru nevndar í § 40 a, stk. 1 og fyri brot á tær ásetingar í fyriskipanum, sum eru givnar við heimild í § 40 a, stk. 1.

Ríkisákærin hevur í rundskrivi nr. 4/2000 pkt. 5.1 umrøtt stødd á sektum fyri brot á reglurnar um koyri- og hvílutíð og fyri brot á reglurnar av nýtslu av takografi og førarakorti. Mett verður, at tað verður ov drúgt at endurgeva hetta í lógaruppskotinum, og tí verður víst til umrødda rundskriv frá Ríkisákæranum, sum er lagt við sum skjal.

**Til nr. 4, § 58 a, stk. 6.**
Hendan ásetingin, sum framman undan fevnir um heimild til at geva eigaranum (arbeiðsgevaranum) bót, verður víðkað til eisini at fevna um brot á ásetingar og fyriskipanir, ið eru givnar við heimild í § 40 a, stk. 1, sum fevnir um brot á nýtslu av takografi og førarakorti. Víst verður eisini til rundskrivið frá Ríkisákæranum pkt. 5.1.2, sum er lagt við sum skjal.

**Til nr. 5, § 58 a, stk. 13.**
Samsvarandi uppskotinum í stk. 13 verður sektin rundað upp til næstu upphædd, sum kann býtast við 500, eins og ásetingarnar um treytaleysa kumulatión (samanlegging av sektum) í § 58 a, stk. 10, 1. pkt. í ferðslulógini, verða nýttar samsvarandi.

**Til nr. 6, § 58 c, stk. 4 og 5.**
*Stk. 4.* Løgreglan kann afturhalda akfør í teimum førum har brot er framt á reglur um mest loyvdu heildarvekt hjá akførum samsvarandi § 38.

*Stk. 5.* Um tað í sambandi við ferðslukanning á vegunum verður staðfest, at førarin ikki hevur yvirhildið reglurnar um koyri- og hvílutíð v.m. kann løgreglan afturhalda akfarið inntil viðurskiftini eru fingin í rættlag.

Um førarin hevur brotið reglurnar um koyri- og hvílutíð v.m. kann akfarið sostatt afturhaldast við tí fyri eyga, at førarin antin á staðnum skal hvíla ella halda steðg ella at ein annar førari verður boðsendur, sum kann halda áfram við koyringini.

Við atliti til at fremja afturhald verða ásetingarnar í rættargangslógini um at leggja hald á lutir nýttar samsvarandi.

**Til nr. 7, § 59 a, stk. 1, nr. 8.**
Broytingin er redaktionel.

**Til nr. 8, § 59 a, stk. 1, nr. 9 og 10.**
**9)** Fyri brot á koyri- og hvílutíðarreglurnar verður skotið upp, at koyrirætturin verður frádømdur treytað, um so er, at førarin er farin út um reglurnar um koyri- og hvílutíð við meira enn 30 %.
Víst verður til nærri reglur um frádøming í rundskrivinum frá Ríkisákæranum pkt. 5.2.1, sum er lagt við sum skjal.

**10)** Fyri brot á reglurnar um nýtslu av takografi, diagrammarki og førarakorti verður skotið upp, at førararætturin verður frádømdur treytað, um so er, at førarin í einum 3 ára tíðarskeiði ger seg sekan í 6 brotum viðvíkjandi takografinum, sum er fevnd av ásetingunum í § 40 a, stk. 1 ella av fyriskipanum, sum eru givnar við heimild í § 40 a, stk. 1.

Víst verður til nærri reglur um frádøming í rundskrivinum frá Ríkisákæranum pkt. 5.2.2, sum er lagt við sum skjal.

**Til § 2**
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Landsstýrismaðurin fær heimild til at seta nærri reglur í kunngerð. Hetta merkir, at ásetingarnar um koyri- og hvílutíð ikki koma í gildi fyrrenn landsstýrismaðurin hevur sett hesar reglur í verk.

Samferðslumálaráðið, 28. januar 2018

**Heðin Mortensen**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Rundskriv hjá Ríkisákæranum nr. 4/2000.